# Jónas og teir taptu

Frem spældi sunnudagin seinasta heimadystin í hesum kappingarínum. Dysturin var ímóti Braband, sum vann 2-1. Tað vóru tó teir á heimaliðnum, sum komu best frá byrjan. Longu tað góðir 10 minuttir vóru spældi, legði Wassin El Banna Frem fram um 1-0. Men fyri hálvleik hevði Braband vent dystinum við tveimum málum. Jónas Tór Næs spældi allan dystin høgri bakkur, og hesaferð var eisini pláss fyri Atla Gregersen á vøllinum seinastu minuttirnar.



# Vejle aftur í superliguni

Um vikuskiftið gjørdist tað endaliga greitt, at Velje flytir upp í superliguna aftur. Vejle hevur ligið í toppinum í donsku 1. deild alt árið, og eftir at teir fyri nøkrum vikum vunnu avgerandi dystin ímóti Lyngby um næstfremsta plássið, hava teir havt góðan mun til hini liðini. Og um vikuskiftið vann Vejle heili 4-0 á Brønshøj, og tað var nóg mikið til at staðfesta uppflytingina. Hóast eitt umfar er eftir at spæla, kann eingin fáa Vejle aftur, og teir flyta upp saman við antin Randers FC, Lyngby ella Køge

# Hava hugsað positivt

**Hóast B68 undan sunnudegnum hevði tapt seks ferðir á rað, so hevur Jóannes Jakobsen ikki kent seg hóttan í venjarasessinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

– Eg havi alla tíðina roynt at gjørt mítt besta, og eina uppsøgn havi eg ikki hugsað so nógv um. Hinvegin, so kenni eg sjálvandi treytirnar, tí sum venjari ert tú einum knallhørðum yrki. Metir leiðslan í felagnum, at onkur annar kann gera eitt betri arbeiði, so verður venjarin skiftur.

Jóannes Jakobsen tykist púrasta avkláraður um leiklutin sum venjari hjá einum liði, sum í hevur sum setning at berjast móti niðurflytingini.

## Positivir tankar

Eitt langt skifti hevur B68 eisini líkst einum góðum boði upp á annan av niðurflytarunum, men við sigrinum á KÍ fekst eitt lítið andahol í so máta.

Sigurin kom sjálvandi væl við. Men fyrst og fremst, so tykist venjarin leggja dentin á, at talan fyri tað nógva hevur verið um eina positiva gongd, hóast úrslitini ikki hava verið eftir vild.

– Sjálvandi vildi tað verið lætt bara at follið í fátt, tí eg haldi ikki, at marginalarnir hava verið við okkum. Tað byrjaði sum so í dystinum í Vági, og síðani tá hava vit fleiri ferðir tapt við einum einstakum máli. Vit hava tó alla tíðina roynt at hildið fast um teir positivu lutir, sum hava verið í spælinum, og hava so arbeitt út frá hesum. Og vit hava alla tíðina roynt at spælt fótbólt, heldur enn at sparka, og tað gav eisini úrslit í dag, har vit høvdu fleiri møguleikar.

– Samstundis, so hava vit eisini verið realistiskir. Frá fyrsta degi hevur málið verið, at vit fyrst og fremst skulu hanga í deildini. Hópurin hevur verið serstakliga tunnur, og eitt nú kom næsta útskiftingin at kalla beinleiðis av skipsdekki, sigur venjarin.

Við hesum sipar hann til, at B68 tá skifti Hansmar Poulsen inn, hóast hann bert hevði verið heima í fáar dagar.

Í so máta var nakað betri hesaferð. Ralph Van Dooren var aftur tøkkur eftir leikbann. Øssur Hansen hevði fríviku frá arbeiðinum í Noreg, og eisini Arnbjørn Danielsen var tøkur eftir skaða.

## Breiddin altavgerandi

Júst breiddin í hópinum tykist vera nakað, sum Jóannes leggur stóran dent á, tá tosað verður um vónirnar fyri seinastu 15 dystunum.

– Tað sigur seg sjálvt, at við einum hópi sum tí, ið vit høvdu ímóti GÍ, er sera avmarkað, hvat vit fáa gjørt. Við Øssuri, Ralph og Arnbjørn aftur á liðnum, fái eg sum venjari beinan vegin nakrar møguleikar, og so tykist Kamal eisini vera um at koma fyri seg. Hann stóð hesa ferð fyri tveimum av málunum, og tað gevur seg sjálvt, at ein slíkur spælari eisini økir um møguleikarnar. Ikki minst tí vit av neyð hava verið noyddir at nýtt Súna Fríða aðrastaðni enn í álopinum.

## Beinini á jørðini

Hóast kærkomin, so fær sigurin í Klaksvík ikki Jóannes at leypa upp frá í ovfarakæti. Setningurin er framvegis tann sami, og klassiska frasan um seinasta dystin tykist vera nakað, sum liggur hon nær.

– Vit hava framvegis bæði beini væl og virðiliga á jørðini. Sjálvandi eru nakrir positivir lutir, sum vit kunnu taka við okkum úr einum slíkum dysti, men fyrst og fremst, so ræður um at halda fast.



*Mustapha Kamal Ndaw tykist verða framúr góður fongur hjá B68. Við skjótleika og neyvleika var hann høvuðsmaðurin í óvæntaða – men uppiborna – sigrinum hjá B68 í Klaksvík*

*Mynd: Álvur*

KÍ-B68 1-3 (0-2):

# Einfaldur sigur

*KÍ*

*B68*

**Toftamenn løgdu seg djúpt, so KÍ ikki fekk yvirspælt teir við longum bóltum, og so vóru gestirnir bæði kvikir og neyvir í kontraálopunum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað lá líkasum ikki í kortunum, at B68 skuldi fáa nakað við sær úr Klaksvík sunnudagin. Við seks tapum á rað í skjáttuni, var útgangsstøðið hjá gestunum alt annað enn gott. Og við 7-1 sigrinum hjá KÍ í Vági fyri viku síðani tóktust vertirnir vera komnir seg væl og virðiliga yvir norðoyastevnutapið.

## Einføld uppskrift

Hagtøl verða tó ongantíð meira enn hagtøl, og toftamenn vildu fyrst sleppa at royna seg, áðrenn teir góvu skarvin yvir.

Uppskriftin var greið. B68 vildi ikki lata seg yvirspæla av mongu longu bóltunum, sum KÍ sendi niðan móti Ova Nysted og Paul Clapson, og tí løgdu teir seg hampuliga djúpt, so lítið og einki rúm var at renna í hjá KÍ'arunum.

Grundleggjandi fortreytin, tá spælt verður við longum bóltum, er, at trýst fæst á verjuna. Og allar helst soleiðis, at verjuspælarar verða noyddir at renna heimeftir í verjustøðu.

Hesum fingu toftamenn tó forða, og tá teir vóru raskir at vinna næstu-bóltarnar, megnaðu teir eisini í nógv størri mun at mynda spælið.

## Vandamikil áleypari

Fleiri ferðir gjørdist talan eisini um vandastøður, og í nýggja gambiska áleyparanum, Kamal, tykist B68 hava funnið ein spælara, sum kann gerast heilt nógv verdur í stríðnum at vinna seg úr botninum.

Tvær ferðir fyri steðgin var hann maðurin, sum sendi bóltin í KÍ-meskarnar, og so gjørdist talan av álvara um mótbrekku hjá KÍ.

Álopsbogin varð spentur og trýstið á b68 øktist. Ein vón tóktist eisini at tendrast, tá Høgni Madsen minkaði um munin, men longu í næsta álopinum gekk galið, tá Súni Fríði Barbá staðfesti sigurin.

Og sigurin var altso als ikki so óuppiborin. Við at spæla skilabetri og við at leggja meira í avrikið hjá hvørjum einstøkum spælara, prógvaðu teir, at hugburðurin altíð skal vera við. Eisini tá toppur og botnur hittast.

Tann setningin høvdu klaksvíkingar gloymt eftir velduga sigurin seinasta vikuskifti, men kanska ein rennitúrur niðan á Klakk kann fáa minnið hjá spælarunum í rættlag aftur…